

# VIL TÚ SÍGGJA "GOTT" ÚT?

DANSK VINDUE CERTIFICERING tryggjar tær, at tíni vindeygu og hurðar eru gjørd úr fyrstafloks tilfari, at tey lúka allar treytir innan byggivinnuna, og at góðskan er í hásæti.

ISO 9001 tryggjar ta somu góðskuna í øllum tilfarinum - hvørja ferð tú keypir.

Alt hetta kann Import bjóða tær!

Import kann bjóða vindeygu og hurðar úr træ, plast ella alutræ.

Um tygum ynskja tilboð til ísetan, ella okkurt skuldi verið áfatt, so samstarvar Import við byggifeløg.

Vindeygu og hurðar koma frá VIKA vinduer í Danmark.



TRÆ

- Vindeygu og hurðar eru framleidd úr kjarnutræ. Kjarnutræ kann ikki rotna tí tað inniheldur í mesta lagi 20% vætu. Rot byrjar við 28–30%.
- Bakfestar glaslistar og síðan segling við sikafleks. T.v.s. ongir sjónligir seymir, ið kunnu rusta
- Superlágorkuglas U:1,1v/argon gass
- Øll skoyti eru tappað saman
- Vinnuyvirflatuviðgerð ið gevur sera sterkt haldføri
- Impregnering v/Fungicider (soppadrepara)/ grundmálað/millum-slípað og síðani sluttlakk. Miðallagstjúkdin er 160 um (vanligt er 90 um)
- Aluminium drypplisti
- 116 mm karmur
- Hitagalvaniserað hongsul v/messingtappi



PLASTIKK

- Rehauprofilur - heimsins mest nýtti profilur til plastvindeygu og hurðar.
- Galvaniserað jarnramma í vindeyga og karmi fyri at styrkja um
- Superlágorkuglas U:1,1v/argon gass
- 120 mm karmur
- 3 pkt. lásmekanisma á hurðum og min. 2 á vindeygum
- Gráir gummilistar uttaná og hvítir listar innan fyri glasið
- Glaslistar á innsíðu fyri at tryggja móti innbroti
- Hondtøk av merkinum Hoppe fylgja við
- Plastikkvindeyga við træsniði



IMPORT

V/TONI DAM · POSTBOKS 3070 · FO 110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
TEL 513 842 · FAX 321 421 · IMPORT@IMPORT.FO · WWW.IMPORT.FO

**5 ára trygd móti framleiðslu- og tilfarsbreki! - Fleiri upplýsingar eru at finna á www.import.fo**

Sosialurin 341800


# Hørð kapping og fegnir vinnarar



**Annað umfar í Prix Føroyar kappingini 2005 fór fram í Fuglafirði um vikuskiftið. Kappingin var sera hørð og ongin bólkur kendi seg tryggan, tá teir dugnaligu, men sera ymisku, bólkarnir høvdu verið á palli. Tá dómaraúrslitini vóru upptald vóru tað tó Makrel og All that Rain, ið komu víðari**

PRIX FØROYAR 2005

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Kavin gjørdi veruliga um seg leygarkvøldið, men so við og við kókaði tað tó í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Tá fyrsti bólkurin fór á pall til annað umfar av Prix Føroyar 2005, var ikki nógv fólk savnað, men skjótt batnaði, og fólk kom í salin.

Talan gjørdist um eina harða kapping, har ongin við vissu dugdi at siga, hvørjir tveir av teimum seks luttakandi bólkunum fóru at tryggja sær pláss í semifinaluni í Trongisvági 2. apríl.

Bólkarnir leiktu allir væl, men torført var at sammeta, tí teir vóru sera ymiskir í framførslu og tónleikastíli.

## Fegnir

Tað tók góða løtu, nærum ein tíma, ella so, innan Jákup Magnussen, frásøgumaður, kundu fara á pallin við tveimum brævbjálvum við nøvnunum á vinnandi bólkunum í.

Millum tónleikarararnar visti ongin at siga, hvar teirra bólkur fleyt, og hevði ivin bert vaksið seg størri í bíðitíðini. Fjáltur var tí á fleiri, meðan ymisk uppskot hoyrdust um, hvør ið átti at hava møguleika.

Tað vóru tí fegnir limir í bólkinum Makrel, sum hoyrdu júst teirra bólk verða róptan upp. Bilsnir, tó vónríkir, fingu teir staðfest, at teir áttu annað plássið í semifinaluni.

Men so gjørdist spenningurin ikki minni, tí nú var so annar bólkurin nevndur, men hvør var nú hin bólkurin? Tað sást, at fleiri høvdu ilt við at hava tamarhald á sær av berum spenningi.

Men tá so navnið All That Rain ljómaði, sótu limirnir í bólkinum fyrst nærum púra paff nøkur sekund, innan tað loysnaði og gekk upp fyri teimum, at teir komu víðari. Tí teir tordu ikki at vænta og vóna hetta.

Men vinnandi bólkarnir fingu sera harða kapping av MMM, Ph 5,5, Side Effect og Róp.

Vit hava stóra frásøgn frá øðrum umfari í Prix Føroyar 2005 í blaðnum í morgin.

## Næminga-konsert í Vági

**Í kvøld klokkan 19 verður næmingakonsert í skúlanum í Vági**

KONSERT

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Týskvøldið klokkan 19 verður næmingakonsert í samkomuhøllini í Vágs Skúla. Næmingar í Musikkskúlanum fara á pall.

Skúlaorkestrið í Vági spælir Beatles-løg og annað og næmingar av Tvøroyri luttaka eisini. Eisini er næmingabólkurin Suðurættin við.

Ulf Nordlund er leiðari av skúlaorkestirnum í Vági og er rættiligt lív komið í tónleikalívið millum næmingar. Arbeitt verður við ymsum ætlanum um uttanlandsferð.

Konsertin í týskvøldið vísir tilfarið, sum næmingarnir hava arbeitt við seinastu mánaðirnar, serliga beint fyri og eftir jólafrítíðina.